

# Venja at basa oljudálking

Jan Müller

14.06.2014 - 21:04

Oljan.fo

Týsdagin fara norðmenn at royna nýggja tøkni, sum skal forða fyri oljudálking á sjónum. Royndin verður á gomlu Frigg-leiðini og varir tríggjar dagar.

Tøknin, sum nú skal standa sína roynd, er ment tey seinastu fýra árini við fleiri royndum, men hetta er fyrstu ferð, at hon verður roynd á sjónum. Spurningurin er so, um útgerðin kann taka oljuna upp so skjótt, sum tey aftan fyri verklætlanina rokna við.

Umleið 180 fólk eru við í royndini umframt ein hópur av oljuumboðum úr eitt nú USA, Brasil, Noregi, Russlandi, Skotlandi, Fraklandi, Nigeria, og Bretlandi. Tey halda til umborð á einum ferðamannaskipi.

Umhvørvismálaráðið í Oslo hevur givið stigtakarunum loyvi til at koyra 65 rúmmetrar av olju á sjógvin. Eftirlit er við øllum við oljuradara, flogfari og fylgisveini.